# Kvik í støðugum vøkstri

Tað eru seks ár síðani, at Hans Michael Hansen segði sítt táverandi fasta starv frá sær, og ístaðin fór undir at selja Kvik-køkar í Føroyum. Fyrstu tíðina gekk hetta fyri seg í einum lítlum kjallara, men trygt og støðugt er fyritøkan vaksin. Í dag húsast Kvik soleiðis á 360 leigaðum ferðmetrum við Staravegin, og fýra mans eru í fulltíðarstarvi, umframt at fakfólk til uppsetan av køkum eisini eru knýtt at fyritøkuni.

Og stendur tað til stjóran, so verður talan eisini um støðugan vøkstur komandi árini.

- Kvik er sum heild í stórum vøkstri. Fyritøkan letur í meðal átta nýggjar handlar upp um árið í bæði Norðanlondum og í Hollandi.

- Og eisini her heima er vøksturin stórur. Nógv verður jú bygt í Føroyum, og sjálvandi royna vit eisini at fáa part av hesum marknaðinum, sigur Hans Michael.

- Sjálvandi royna vit altíð at hava nøkur góð tilboð, sum eru til gagns fyri brúkaran. Men hartil haldi eg eisini, at tað er ein trygd hjá brúkarunum, at vit eru partur av einum somikið stórum samtaki. Bæði hvat viðvíkur góðsku og veitingartrygd ger hetta, at vit altíð eru ajour, og tað gevur okkum eisini eitt sterkt bakland, um talan er um ynski, sum eru meira enn tað vanliga, sigur Hans Michael.




























